# Kjak



Johan Petersen

## Hon segði alt, hóast hon onki fekk sagt –

*meðan Torbjørn Jacobsen rýmdi undan veruleikanum og setti seg at skriva um tað, hann hvørki sá, hoyrdi ella føldi. Tess størri ósannindi, hann brúkar, tess harðari rópar hann*

Fríggjadagin farna bleiv eg uppringdur av løgtingsskrivstovuni og biðin at koma á fund í fíggjarnevndini saman við Zakariasi Wang at gera viðmerkingar til blokkstuðulin. Helt tað satt at siga vera ein joke, men tað var tað ikki, vóru boðini. Fekk eisini at vita, at eg hevði skyldu at møta.

Hví júst eg varð boðsendur, veit eg ikki, men tá ið eg nú skuldi møta, helt eg tað vera neyðugt seriøst og álvarsamt at vísa á, hvat kann gerast betur, enn tað, sum nú verður gjørt. At Zakarias ikki møtti, er ikki mín ábyrgd.

### Søk teirra ungu, sjúku og veiku

At endurtaka sambandsáskoðanina á blokkin var óneyðugt, tað vita allir politikarar og alt Føroya fólk útmerkað – og tað er málið alt ov álvarsamt til. Tí valdi eg at tosa søk teirra, sum harðast verða rakt av tí høpisleysa og í fávitsku at frásiga sær pening, vit eiga, hava rætt til og kanska enntá, heldur onkur, hava krav uppá, samstundis sum vit hava so harliga brúk fyri honum.

Tá ið uml. 75% av fíggjarløgtingslógini er til útbúgvingarmál, heilsumál og almannamál, eru tað sjálvandi tey ungu, tey sjúku og tey veiku, sum fyrst verða rakt, tá ið peningur trýtur.

### Vilja ikki hava pening til tey sjúkuraktu

Valdi at taka ein einstakan bólk, sum dømi – tey førleikatarnaðu: tey sum eru rakt av heilabløðing, blóðtøppi, øðrum sjúkum ella skaða. Hesin bólkur fær viðgerð á sjúkrahúsinum, men verður síðan sendur til hús til – **onki**. Ongin skipað endurvenjing finst í Førjum og tey fáu plássini, sum eru á sjúkrahúsunum í Klaksvík og Suðuroy og á Mørkini í Streymnesi nøkta so ómetaliga langt frá tørvin.

Fleiri álit eru gjørd, hvussu málið kann loysast, men tey eru tíverri vorðin vanlig skuffuálit. T.d. kostar tað bert 1,3 mió. kr. at seta í verk endurvenjing, viðlíkahaldsvenjing og fyribyrgjandi venjing fyri alla Eysturoynna, men hetta er tað ikki peningur til – hví? tí vit siga nei-takk til prísjavning av blokkinum. Vit og skil? Nei! Kenslur? Kanska, men so er tað egingóðska og ikki kenslur fyri teimum sjúkuraktu!

### Ræðumyndin er veruleiki í dag

Hetta var tað, eg vísti á og fyri at gera politikararnar varugar við, at tað finst ein bólkur av tigandi føringum, sum ikki fær gørt vart við seg, valdi eg at hava eina kvinnu, sum ikki fær tosað og noyðist at sita í rullustóli, við, so fíggjarnevndarlimirnir skulu vita um henda bólkin, teir ikki vilja játta pening til. Henda kvinnan segði alt, hóast hon onki fekk sagt.

Nei Tobbi! Hetta er **ikki** ein ræðumynd um, hvussu tað verður um Tjóðveldið fær ræði aftur. Hetta **er** ein ræðumynd, sum **er** veruleiki í dag og hevur verið tað í nógv ár! Tíverri!! Men nakrir politikarar vilja ikki síggja veruleikan í eyguni – onkur rýmir heldur.



Petur Elias Petersen
*ÍSF-forseti*

## Vantandi virðing fyri sjálvbodna arbeiðinum í ítróttafeløgunum

Tað kom dátt við, tá stjórn ÍSF's kundi staðfesta, at tað sjálvbodna arbeiðið, sum verður gjørt í ítróttafeløgunum kring alt landið, nú skal svíða fyri at fáa Løgtingsfíggjarlógina fyri 2011 at hanga saman.

Hóast játtanin til ítróttina stórt sæð bara er lækkað seinastu 20 árini, hevur man í uppskotinum fyri 2011 valt at skera enn eina hálva millión av tí stuðli, sum Løgtingið letur Ítróttasambandi Føroya, og harvið til føroyska ítrótt.

Vit standa spyrjandi og undra okkum yvir hugburðin, sum landið vísir við hesum. Tí boðskapurin hongur ikki saman. Tað er rørsluár í ár, har tað eisini frá politiskari síðu verður víst á, hvussu týdningarmikið tað er at fólk røra seg og íðka ítrótt undir skipaðum viðurskiftum. Í ÍSF kunnu vit eisini við gleði staðfesta, at talið av feløgum í felagsskapinum bara økist, føroysku fólkaheilsuni til frama.

Tá vit annaðhvørt ár senda okkara ítróttaungdóm at umboða Føroyar á Oyggjaleikum, fáa vit eisini váttað frá politiskari síðu, hvussu týdningarmikið arbeiðið er, sum verður gjørt innan føroyska ítrótt. Sama er galdandi, tá okkara fremstu ítróttafólk koma heim við glitrandi altjóða heiðursmerkjum um hálsin.

Men tað sæst bara ikki aftur í politikkinum. Her miðskeiðis í rørsluárinum 2010, og júst sum sersambondini eru mitt í fyrireikingunum til oyggjaleikirnar á Isle of Wight næsta summar, koma boðini frá almennari síðu um, at skerjast skal enn ein hálv millión av stuðlinum til ítróttina.

Hetta skal síggjast í ljósinum av, at ÍSF longu hevur mist stuðulin til ein ítróttaráðgeva, umframt at ein millión var skorin av stuðlinum til fótbóltin í sambandi við ólavsøkupakkan í fjør. Hervið hevur ítróttin mist 1,85 millión krónur bara innan fyri seinastu trý árini. Ístaðin hava vit fingið 600.000 krónur at stuðla úrvalsítrótt við, sum vit sanniliga fegnast um, men tað kemur jú ikki breiðu ítróttini tilgóðar.

Stjórnin í ÍSF harmast um hesa gongd, tí tað er eisini á øðrum økjum, at ítróttin er fyri vanbýti. Eitt nú fingu vit lyfti um eina mvg-afturbering tá stuðulsskipanin til ítróttaanlegg og samkomuhús fór úr gildi, men hóast givin politisk lyfti, er einki víst í verki í hesum máli.

Tað tykist sum um, at politiska skipanin als ikki hevur fatað tað ómetaliga stóra virði í tí, sum sjálvboðin innan ítróttalívið kring allar Føroyar gera dag og dagliga. Í mun til so nógv annað, sum peningur verður játtaður til á løgtingsfíggjarlógini, so er tann hálva milliónin, sum nú verður skorin frá ítróttini piparnøtur, og tað er samlaða upphæddin til ÍSF upp á 4,75 milliónir jú eisini.

Um hetta uppskotið verður atkvøtt ígjøgnum í verandi líki, verður hetta til stóran skaða fyri tað, sum vit hava roynt at bygt upp innan ÍSF gjøgnum seinastu árini. Vit hava tvey starvsfólk í umsitingini, harav annað virkar sum ítróttaráðgevi. Umsitingin kann ikki skerjast meira, annars dettur øll samskipanin av ítróttini innansum uttanlands sundur.

Longu nú byggir størsti parturin av arbeiðinum, sum verður gjørdur í ÍSF-húsinum upp á sjálvbodna arbeiðsmegi. ÍSF húsið virkar jú sum ein ambassada, sum javnan sendir fólk út í heimin at umboða Føroyar – og eg eri sum ÍSF-forseti errin av hesari umboðan. Tað tykir ikki sum myndugleikarnir eru eins ernir av okkara ambassadørum á altjóða leikvøllunum, sum politikarar og ráðharrar annars siga seg vera, tá teir halda heiðursrøður fyri okkara vinnarum. Við hesum lag, verður avmarkað, hvussu nógvum ambassadørum vit kunnu heiðra við heimkomu, tí ráðini vera ikki at senda tey avstað.

Skerjingin av játtanini kemur í høvuðsheitum at ganga út yvir ítróttaliga virksemið hjá ÍSF og sersambondunum. Vit kunnu rokna við, at landslið detta niðurfyri, og sama er galdandi fyri førleikamennandi skeið av eitt nú venjarum og dómarum.

Hetta harmonerar ómetaliga illa saman við tí veruleika, at alt fleiri føroyingar íðka ítrótt í skipaðum feløgum samstundis sum heilsumyndugleikar og politiskir myndugleikar eggja øllum til at røra seg meira.

Næsta ár eru ætlanir um at seta kostin á dagsskránna. Eins og við rørsluárinum metir ÍSF seg hava eina týdningarmikla uppgávu fyri at broyta vanarnar hjá føroyingum, og serliga tí uppvaksandi ættarliðnum, á eina heilsubetri kós. Men kann hetta fremjast við eini lækkandi játtan?

Tí er vón okkara, at politikararnir á Føroya Løgtingi og í tess fíggjarnevnd síggja virðið, sum verður gjørt í ÍSF og í ítróttafeløgunum, og at hesir virða hetta arbeiði við í minsta lagi at lata vera við at skerja játtanina í oyggjaleikaárinum 2011.